## Eykaaðalfundur

Fimleikafelagið Støkk lýsir hervið til eykaaðalfund, í Glyvra skúla hósdagin 4 september 2008, kl. 20.00

**Við hesi dagskrá:**

1. Val av fundarstjóra
2. Viðtøkubroyting
3. Søla av fastari ogn
4. Bygging av nýggjari høll
5. Fígging
6. Leigusáttmáli um útleigan av nýggju høllini
7. Ymiskt.

**Møtið fjølment**

**FIMLEIKAFELAGIÐ STØKK**

## Okkara lega

Heimamissiónin bjóðar rørslu- og menningartarnaðum o.ø., saman við avvarandi á legur í Nesvík

Seinasta freist at tekna seg er 6. september.
Send seðilin til:

Kirkjuliga Heimamissiónin
FO-437 Nesvík

Eisini kann ringjast til:
Nesvíkar á tlf. 470000, Seminu á tlf. 444878
ella til Marjun á tlf. 447147

*12. - 14. sept.*

**2008**



## Skrivstovubygningur til leigu

Sera snotiligur arkitektinnrættaður skrivstovubygningur í R.C Effersøesgøtu 22, á uml. 300 fermetrar, til leigu.

Bygningurin stendur sera væl fyri við góðum útsýni og hevur parkeringsviðurskifti til uml. 10 bilar. Einans 2 min. at ganga oman á Vaglið.

**Grundhædd:** Fundarhøli - køkur arkivrúm/skrivstova og wc
**Miðhædd:** Móttøka – skrivstovur
**Loft:** Skrivstovur – teldurúm og eitt Fundarhøli við sera góðum útsýni yvir alla Havnina

Skrivstovupláss er fyri uml. 12-14 fólkum.

**Áhugað kunnu ringja á fartelefon 216398**



## HÚS TIL SØLU

**Dubult hús matr. nr. 1003a Velbastaðvegur 4 Tórshavn til sølu**

Húsini eru í tveimun hæddum á 64m² hartil eru 20m² á ovastalofti partvís liðugt innrættað.

Grundøkið við stórum parkeringsplássi er 417m² til víddar.

Vakurt útsýni yvir Nólsoyarfjørð og Argir.

### Í húsunum eru tvær íbúðir

Í erva eru tvey sovirúm, stova og køkur saman, gongd og baðirúm.

Á ovastalofti eru tvey rúm tilsamans 20m² har annað rúmið er liðugt og kann nytast sum sovirúm.

Í neðra er egin inngongd, verktoysrúm, køkur, kamar, stova og stórt baðirúm.

Húsini eru bygd í 1980 og høvuðsumvæld 2003.

**Minsta boð: 1900000**

**Áhugaðir keyparar kunnu venda sær til Jonfinn Árnafjall tlf. 310504 ella 233402. Jonfinnur@gmail.com**

## Eydnuhjól

Haldórsvíkar Avhaldsfelag hevur eydnuhjól, fiskibrunn og matsølu sunnudagin 7. sept kl. 16.00

At vinna verður m.a. lomb, trambolin, súkkla, leikutoy og nógvir heimagjørdir lutir.

**Øll eru vælkomin**

**NEVNDIN**

Lesið Sosialin -so eru tit við!

## Útsølan heldur

**fram hesa vikuna til og við leygardagin 6. september**

**-30% -50% -70% av allari útsøluvøru**

**Opið er:**
Mán. - hósd:..... 10.00-17.30
Fríggjad: .......... 10.00-18.00
Leygardag:....... 10.00-14.00

**Sonja Design**
Stoffalág 41, Tórshavn
Tlf. 31 49 79

## KUNNGERÐ

### um broytingar í bygdarskipanini og byggisamtyktini fyri Vestmanna Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, seinast broytt 13. mai 1992, um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum boðað frá, at Vestmanna Bygdarráð á fundi 26. august 2008 hevur samtykt at gera broytingar í bygdarskipanini og byggisamtyktini fyri Vestmanna.

**Størri broytingar í bygdarskipanini**

- striking av havnarøki á Grønanesi
- víðkan av havnarøki á Heyganesi og við nýggja havnarlagið
- alment frítíðarøki Úti á Toft
- alment frítíðarøki í Flatabø
- striking av øki til almennar stovnar í Vestri og tilsvarandi víðkan av sethúsaøki
- víðkan av vinnuøki við Hornaveg
- alment frítíðarøki rundan um hylin innanfyri nýggja havnarlagið
- broytingar og tillagingar av miðstaðar- og havnarøki Undir Holmabakka
- víðkan av frílendinum omanfyri skúlan í Frammbø
- broyting av ætlaðum vegi og sethúsaøkjum omanfyri Rógvu
- burturtøka av ætlaðum gongugøtum í Garðastovubønum og ímillum Gerðisveg og Rógvuveg
- nýtt parkeringsøki í Garðastovubønum
- broyting av sethúsaøkjum og víðkan av frílendum á Fitjum
- broyting av ætlaðum vegi til sethúsaøki ímillum Leitisveg og Ovara Veg
- víðkan av sethúsaøki við Leitisveg
- nýggj økir til frítíðar- og summarhús, húsvognar og tjalding uttanfyri Fossá ímillum Ovara Veg og Niðara Veg og á økinum niðanfyri landsvegin Inni á Fjørð

Harafturat eru smærri tillagingar gjørdar í bygdarskipanini og tillaging og dagføring av byggisamtyktini.

Broytingarnar liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni

**í vanligari skrivstovutíð**
**frá 3. til 24. september 2008**
**– báðir dagar íroknaðir.**

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, skulu verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi 3. desember 2008.

**VESTMANNA KOMMUNA**

Bakkavegur 16 | Postboks 91 | 350 Vestmanna

Lesið Sosialin -so eru tit við!

veitst tú ikki tað?
Sosialurin